# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Standa sterkir saman

So er fótbóltsárið 2008 liðugt. Tað er greitt, hvør hevur vunnið heiðursmerkini, og hvør er fluttur niður og upp, og EB/Streymur hevur fingið steyp og gullkrónur, sum sjónligu staðfestingina av, at felagið hevur vunnið FM fyri fyrstu ferð. Tað er framúr úrslit. Ikki minst tá ið havt verður í huga, at liðið fyrr í summar eisini vann steypakappingina.

Sosialurin og alt Miðlahúsið ynskir Sundalagnum hjartaliga tillukku við avrikunum. Samstundis loyva vit okkum at halda, at hetta er týðulig undirstriking av, hvat kann spyrjast burturúr samstarvi og samanlegging.

Inntil fyri fimtan árum síðani vóru EB og Streymur argastu kappingarneytar, sum bardust um pláss í næstbestu deildini.

Nú eru fimtan ár síðani, at feløgini vórðu løgd saman. Fyrsta royndin í bestu deildini miseydnaðist. Síðani hevur gingið støðugt rætta vegin. Í fjør vunnu teir steypakappingina, í ár hava teir vunnið steypakappingina og landskappingina, og í heyst, tá ið tað endiliga hevur gingið rætta vegin hjá landsliðnum, hevur nýggja meistaraliðið átt fleiri spælarar á liðnum enn nakað annað.

Orsøkin er eyðsýnd. Breiddin og harvið innanhýsis kappingin og intensiteturin eru vorðin størri. Tað ber við sær, at allir gerast betur, enn teir annars kundu havt verið. Møguleikarnir fyri betri leiðslu og skipan av kørmunum og innihaldinum eru betri, enn tað annars hevði verið hugsandi at gjørt, og hjá stuðlunum hevur tað verið hugaligari at standa aftanfyri, enn tað annars hevði havt verið.

Ofta verður sagt, at samleikin kámast og hvørvur, tá ið tað verður lagt saman. Omanfyri nevnda vísir, at soleiðis hevur tað ikki verið í hesum førinum. Áskoðararnir hava eisini tikið uppaftur dyggiligari undir, enn teir frammanundan hava gjørt við feløgunum báðum.

Í so mongum øðrum viðurskiftum og umstøðum í lítla landi okkara tykist tað vera torført at finna saman í samstarv og kanska samanlegging, um tað so er politiskt í landshøpi og kommunuhøpi, vinnuliga og búskaparliga ella mentanarliga og átrúnaðarliga.

Tað er ikki altíð rætt og neyðugt at leggja saman. Men gongdin hjá samanlagda ítróttarfelagnum í vakstrarøkinum við Streymin – suður til Kollafirðar og umvegis Eiði og norður til Gjáar – er sólskinssøga um, at tað ber væl til at finna samleika, sum aftur er grundarlag undir menning og gróðri. Í Sundalagnum standa teir sterkir saman!

**Sosialurin**

## Umhvørvið er álvarsmál



**BJARNI DAHL**
Tórshavn, Valevn fyri Javnaðarflokkin

Nógv er gjørt á umhvørvisøkinum tey sinastu árini. Tórshavnar kommuna er einasta kommuna í landinum, sum í verki er farin undir stóra arbeiðið at dagføra kloakkirnar. Tá hettar arbeiðið er liðugt í 2010, rennur onki spillvatn óviðgjørt á sjógv. Allar áir í býnum eru reinar. Sílini svimja nú aftur so lystiliga í Rættará. Endurnýtslan er komin í lag á Sandvíkarhjalla og í Kollafirði. Samanumtikið er Tórshavn ein nógv reinari kommuna í dag, enn hon var fyri fýra árum síðani.

Tó er enn langt eftir á mál. Neyðugt er frammhaldandi við einum virknum og frammskygdum umhvørvispolitikki. Vit mugu gevast at hugsa vanabundið. Vit mugu tora at ganga nýggjar leiðir. Vit mugu taka tey góðu átøkini rundanum okkum í álvara.

Eitt nu er neyðugt at herða krøvini til bjálving. Tey fleystu hugsa nokk, at hettar ljóðar dýrt..., men tað nýtist tað als ikki verða. Her tørvar okkum heldur ikki at uppfinna tann djúpa tallerkin av nýggjum. Royndir hava víst, at lágorkubygging er einasta gongda leið. Tað nýtist heldur ikki vera nógv dýrari enn "vanlig" bygging. Harafturat nógv bíligari í nýtslu.

Ein skipan má gerast at stuðla fólki at eftirbjálva sethús. Rentufrí lán kundu verið ein møguleiki. Við munagóðari eftirbjálving kann sparast upp til 50% av oljunýtsluni.

Í samráð við serkøn má byggimynduleikin (kommunan) dagføra byggikrøv og harvið stuðla byggivinnuni at ganga nyggjar leiðir. Tað fer neyvan at henda av sær sjálvum – tí má myndu-leikin ganga á odda.

Tórshavnar kommuna má leggja trýst á landsmynduleikarnar at avtaka MVG og onnur avgjøld á umhvørvisvinarligum hitaskipanum, so sum hitapumpum, sólfangarum og øðrum, so tað gerst møguligt hjá vanligum fólki at gera íløgur í hesi. Ráðgevingin, um hesar skipanir, má eisini betrast.

SEV, sum kommunurnar eiga og varða av, má vakna. Ger SEV ikki munandi meira við at umleggja sína framleiðslu til varandi og uhvørvisvinarliga orku, verða vit ongantíð leys av kolvetnisorkuni. Málið má vera at dieselmotorarnir kunnu sløkkjast sum skjótast. Tað ber væl til, eisini uttan at turrleggja allar áir í landinum, og tilgongdin má ganga skjótari enn higartil.

## Musikkskúlin á breddan



**JÓGVAN ARGE**
varaborgarstjóri

**Tjóðveldi setir musikkskúlamálið á skrá í býráðnum, so skjótt, sum nýggja býráðið fer til verka, og endamálið er at fáa skúlan til vega í komandi valskeiði**

Tórshavnar Musikkskúli hevur gjørt vart við, at skúlans umstøður eru ikki tíðarhóskandi. og tað forðar einum stórum parti av áhugaðum børnum og ungum at sleppa upp í part.

Hetta sjónarmið hevur verið ført fram í fleiri ár, og ymsar royndir hava verið gjørdar at koma longur fram á leið, men higartil er ov lítið ítøkiligt hent. Tórshavnar kommuna varðar av Musikkskúlanum í høvuðsstaðnum, sum er landsins størsti, og henni áliggur at útvega skúlanum góðar arbeiðsumstøður.

Børnini og ungdómurin eru okkara besta tilfeingi. Tað hevur nógv at siga, at tey fáa frálæru í tónleiki av ymsum slag. Tað er mennandi fyri tey og ger sítt til, at tey fáa eitt ríkt lívsinnihald.

Tað hevur eisini víst seg, at frálæran í Føroyum hevur givið afturljóð bæði heima og uttanlands. Tónleikalívið sum heild er ríkað almikið, og tað dylst ikki, at Musikkskúlin hevur upplært tónleikarar, sum standa seg millum tey frægu úti í heimi.

Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini lagt alstóran dent á at dagføra karmarnar hjá fólkaskúlanum. Ein skúli er í gerð í Hoyvíkshaganum og ein annar á Argjum, og tað eru ikki smá fíggjarlig tøk, sum har verða tikin.

Men eina ferð fara tær byggingarnar at hæsa av. Tjóðveldi hevur í síni valskrá staðfest, at flokkurin vil útvega tónleikinum góðar framførslu- og venjingarumstøður, og virkar fyri, at Musikkskúlin fær hóskandi karmar.

Hetta merkir, at fáa vit ávirkan eftir býráðsvalið, so fara vit beinanvegin at leggja áherðslu á, at musikkskúlamálið veruliga verður sett á breddan við tí endamáli at fáa hann til vega í komandi valskeiði.

Fyrsta takið er at fáa undirtøku í samgongu og býráði fyri, at Musikkskúlin fær nýtíðarhóskandi hølir, og síðani skal málið viðgerast fakliga, politiskt og fíggjarliga, so vit fáa ta bestu loysnina til frama fyri allar partar.

Kommunan hevur lagt eina vegleiðandi íløguætlan fyri næstu árini, og har er Musikkskúlin uppií. Tað vil siga, at hann loksins er komin inn í tær fíggjarligu raðfestingarnar, og tað er eitt týðandi stig fyri at koma víðari.

Samanumtikið: Tjóðveldi setir musikkskúlamálið á skrá í býráðnum, so skjótt, sum nýggja býráðið fer til verka, og endamálið er at fáa skúlan til vega í komandi valskeiði.

**Gjald fyri valgreinar**

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórnin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.